
jon@skyn.fo


maiken@skyn.fo


mildrid@skyn.fo


sigtor@skyn.fo

KLAKSVÍK
Sethús, Mylnugøta 1



330 | 546 | 3 | 1976

Stór, væl hildin hús. Miðhædd: hjallur, gongd, baðirúm, brúggers, køkur, stova. Niðasta hædd: gongd, baðirúm, kamar, fýrrúm/vaskirúm/grovkøkur. Ovasta hædd: gongd, klædnarúm, baðirúm, 5 kømur. Gott bilhús hoyrir til húsini. Ógvuliga snøgt uttanum við stórari grasplenu, flísaløgdum túni og stórari terassu. Sera gott útsýni.

Prísuppskot: kr. 2.000.000

EIÐI
Jørð, Yviri á Stígum



9.383

Jørð á Eiði til sølu, matr.nr. 279a. Innangarðs: 9.393 fermetrar, sum liggja heilt oman til vatnið. Uttangarðs: 4 gyllin, sum eru á suðursíðuni av Slættaratindi.

Prísuppskot: kr. 200.000

TÓRSHAVN
Sethús, Eiriksgøta 12



80 | 240 | 1 | 1950

Hús í einari hædd umframt 2 lítil kjallararúm og ein hjallur. Í húsunum er durur, gongd, baðirúm, køkur, 5 kømur og vaskirúm. Húsini verða umvæld í løtuni, m.a verður takið skift. Húsini standa væl fyri í veðurgóðum og friðarligum umhvørvi nærindis miðbýnum. Stutt er til handils.

Prísuppskot: kr. 1.100.000

SALTANGARÁ
Sethús, á Norðurhædd 4



352 | 598 | 3 | 2009

Nýggj, stór hús í 2 hæddum. Ovara hædd: gongd, 2 baðirúm, grovkøkur, køkur, stova og 4 kømur. Niðara hædd: bilhús á 38 fermetrar, gongd, kamar og fýrrúm og ein íbúð, sum er í gerð: gongd, baðirúm, køkur, stova og 2 kømur. Húsini standa ovarlaga í Saltangará og hava sera gott útsýni.

Prísuppskot: kr. 2.500.000

SØLDARFJØRÐUR
Sethús, Gerðisvegur 19



230 | 1442 | 2 | 1982

Væl hildin hús í 2 hæddum. Ovara hædd: durur, gongd, baðirúm, køkur, stova við hurð út á stóra altan og 3 kømur. Úr hjúnarúminum er útgongd til eina minni altan. Niðara hædd: durur, gongd, baðirúm, 2 kømur og bilhús. Frammanfyri húsini er grasplena og fleiri runnar. Húsini standa við blindveg og hava sera gott útsýni. Góð parkeringsviðurskifti.

Prísuppskot: kr. 1.375.000

MIÐVÁGUR
Sethús, Jatnavegur 15



162 | 305 | 3 | 1931

Eldri hús í 3 hæddum. Miðhædd: baðirúm, gongd, køkur og stova. Ovasta hædd: gongd, vesi og 5 kømur. Niðasta hædd: kjallararúm. Eisini er stórur hjallur til húsini og ein lítil urtagarður. Húsini standa mitt í bygdini við høvuðsvegin.

Prísuppskot: kr. 600.000

TÓRSHAVN
Grundøki, Blankagøta 1



525

Talan er um sethúsagrundøki á Norðasta Horni. Stykkið er útgrivið og planerað við ábygdari sethúsagrund og grund til bilhús. Byggjast kann ikki á verandi bilhúsagrund, sum skal takast niður, og ber keyparin kostnaðin av hesum. Stykkið verður selt til hægstbjóðandi í fríari sølu. Seljari tilskilar sær rætt til at havna øllum boðum, um keypsprísurin verður mettur ov lágur.

STREYMNES
Sethús, Streymnesvegur 30



97 | 250 | 3

Hús í 3 hæddum. Miðhædd: inngongd, gongd/vaskirúm, baðirúm, køkur og stova við hurð út í garðin aftan fyri húsini. Ovasta hædd: gongd og 4 kømur. Niðasta hædd: óinnrættaður kjallari. Í 2007 vórðu húsini umvæld. Vestan fyri húsini er ein stór terassa. Húsini standa í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi. Gott útsýni.

Prísuppskot: kr. 650.000

HOYVÍK
Sethús, Hvítanesvegur 43



220 | 670 | 2 | 1980

Hús í 2 hæddum. Niðara hædd: durur, gongd, 2 baðirúm, køkur, stova, 3 kømur, fýrrúm og hjallur. Ovara hædd: stova og 2 kømur. Harafturat er bilhús á 40 fermetrar. Húsini standa væl fyri beint við Hoyvíkar skúla, Studentaskúlan, Hoyvíkshøll, ansingarstovnar, Keypssamtøkuna í Hoyvík og fleiri arbeiðsplass. Sera gott útsýni.

Prísuppskot: kr. 2.100.000

KLAKSVÍK
Vinnubygningur, Stangaskákið 1



624 | 719 | 3 | 1984

Vinnubygningur í 3 hæddum. Miðhædd: durur, móttøkuhøli, stórur salur, 2 vesi og vaskirúm. Ovasta hædd: gongd, 2 fundarhøli, 2 skrivstovur, tekøkur og 2 vesi. Niðasta hædd: kjallararúm. Bygningurin, sum er væl egnaður til skrivstovur, handil og annað virksemi, stendur væl fyri við høvuðsvegin. Góð parkeringsviðurskifti.

Prísuppskot: kr. 3.150.000

FUGLAFJØRÐUR
Sethús, Ennivegur 52



127 | 258 | 3 | 1945

Hús í 3 hæddum. Miðhædd: durur og køkur/stova. Ovasta hædd: gongd, baðirúm og 2 kømur. Í niðastu hæddini er kjallararúm/vaskirúm/fýrrúm. Húsini standa miðskeiðis í bygdini við sera góðum útsýni.

Prísuppskot: kr. 700.000

HOYVÍK
Raðhús, Maritugøta 16



114 | 136 | 2 | 2003

Snotilig raðhús í 2 hæddum. Niðara hædd: gongd, vesi/vaskirúm og køkur/stova. Ovara hædd: gongd, baðirúm, 3 kømur. Harumframt ovastaloft og úthús/hjallur. Ventilatión í báðum hæddum. Flísalagt tún. Gott og barnavinarligt umhvørvi við góðum grannalagi, spæliplássi og FIFA-vølli. Dagstovnur og býlingshús er í gøtuni, og stutt er til skúlar.

Prísur úr: kr. 1.950.000

SENDIST OVAN

KLAKSVÍK
Sethús, Skarðsvegur 5



429 | 3 | 1951/1986

Hús við 2 búeindum. Onnur búeindin er í 3 hæddum: í miðhæddini er gongd, køkur og 2 stovur. Ovasta hædd: gongd, vesi og 4 kømur. Niðasta hædd: lítil durur, vesi, 2 kømur og vaskirúm/fýrrúm. Hin búðeindin er í 2 hæddum: í niðastu hæddini er durur, gongd, baðirúm og 2 kømur. Ovasta hædd: inngongd, køkur og stova. Húsini standa væl fyri mitt í Klaksvík.

Prísuppskot: kr. 1.050.000

ARGIR
Sethús, Garðsgøta 4



252 | 600 | 2 | 1997

Snøgg, væl hildin hús í 2 hæddum. Ovara hædd: durur, vesi, grovkøkur við útgongd til hjall, køkur, stova við hurð út á altan og terassu, 3 kømur og baðirúm. Niðara hædd: íbúð. Í íbúðini er: durur, køkur/stova, 3 kømur og baðirúm/vaskirúm. Bilhús hoyrir til ognina. Garður er rundan um húsini, og frammanfyri er urtagarður við tráum og runnum. Húsini standa væl fyri, og stutt er til allar hentleikar.

Prísuppskot: kr. 2.600.000

ARGIR
Sethús, Norðurstíggjur 6



210 | 546 | 2 | 1977

Hús við 2 íbúðum. Í størri íbúðini, sum er ovara hædd og partur av niðaru hædd, er: durur, gongd, 4 kømur, køkur, stór stova, baðirúm, vesi og vaskirúm. Niðara hædd: ein partur er sjálvstøðug íbúð við duri, gongd, baðirúmi, køki, stovu, kamari og fýrrúmi. Klædningur, tak og vindeygu vórðu skift í 2007. Húsini standa í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi og hava gott útsýni.

Prísuppskot: kr. 2.275.000

TÓRSHAVN
Sethús, Landavegur 72



178 | 659 | 2 | 1956

Hús í 2 hæddum. Ovara hædd: gongd, baðirúm, køkur og stova. Niðara hædd: durur, gongd, 3 kømur og fýrrum. Húsini vórðu umvæld í 2001. Tá vórðu tak, vindeygu, klædningur og hurðar skift og eisini sanitet, el- og vatnleiðingar. Húsini standa væl fyri í vesturbýnum, stutt frá skúla, ansingarstovnum og handli. Gott busssamband.

Prísuppskot: kr. 2.000.000

VESTMANNA
Sethús, Bakkavegur 39



128,5 | 400 | 3 | 1980

Eldri hugnalig hús í 3 hæddum. Miðhædd: durur, køkur, 2 stovur og kamar. Ovasta hædd: gongd, baðirúm og 3 kømur. Niðasta hædd: kjallararúm. Eisini hoyra neyst, hjallur og úthús til húsini. Húsini standa niðri við sjóvarmálan í Vestmanna.

Prísuppskot: kr. 600.000

NORÐRAGØTA
Sethús, Stallagøta 7



156 | 259 | 3 | 1964

Hús í 3 hæddum. Miðhædd: gongd, baðirúm, køkur og stova. Ovasta hædd: gongd og 3 kømur. Niðasta hædd: kamar, køkur/stova og kjallararúm. Takið varð skift í 2001, vindeyguni í 1996/2001, og klædningurin er skiftur nýliga. Húsini standa ovarlaga í bygdini við góðum útsýni.

Prísuppskot: kr. 950.000